# Nú fáa konufólkini sína egnu sjónvarpsrás

Danska sjónvarpsrásin TV Danmark, ið nógv húski í Føroyum síggja, heldur uppat við at senda 30. apríl. í staðin fer spildur nýggja rásin Kanal 4 í luftina. Hetta er ein rás, ið vendir sær til kvinnur, og sum fer at senda tilfar, ið leggir seg eftir at undirhalda hendan málbólk, skrivar eb.dk í dag.

Felagið aftan fyri rásina er SBS, ið frammanundan eigur TV-Danmark, Kanal 5, The Voice TV, Canal+ rásirnar og C-More. Umframt útvarpsstøðirnar Radio 2 og The Voice. Stjórin í SBS sigur við Ritzau, at TV Danmark er ein breið rás. ið hevur havt sína tíð. Nú er tørvur á at fylla eitt hol á sjónvarpsmarknaðinum. Nógvar støðir royna at nøkta tørvin hjá monnum, men nú skulu kvinnurnar fáa sína egnu støð, ið byggir á teirra sjónvarps vanar og tørv. Kanal 4 byrjar at senda 1. mai.

**nud**

# Buldur og brak í PunkMiðStøðini

SMS verður fríggjadagin og leygardagin til PMS, tá punkbólkurin The Dreams spælir ikki færri enn fýra konsertir í PunkMiðStøðini. Fyrr hava 200 spælt sera væl eydnaðar punk konsertir í hesum ósannlíka og sera ópunkutta spælistaðið.

The Dreams gjørdist kendur við síni luttøku í sendingini MTV A Cut, har bólkurin spældi seg fram ímillum 3 teir bestu nýggju bólkarnar í Evropa sambært songkvinnuni Anastaciu og einum fyrrverandi A&R manni hjá Sony.

Tað skilst á umboðsmanninum hjá The Dreams, at bólkurin arbeiðir miðvíst fyri at troyta teir møguleikar, ið luttøkan í MTV sendingini gav teimum. Hetta arbeiðið fer vónandi skjótt at geva avkast. Í meðan vit bíða eftir altjóða gjøgnumbrotinum og ikki minst eini fløgu við teirra óvanliga fangandi punki, kunnu vit punka við teimum á torginum í SMS fríggjadagin kl. 13.30 og 18 og leygardagin kl. 12 og 15.

**nud**

HANDILIN

Spennandi sølustarv í LM Handlinum

Søkt verður eftir einum sølufólki, ið hevur áhuga, hugflog og áræði at vera við til at menna LM Handilin.

**Vit kunnu bjóða**
tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv innan handilsyrkið. Vit hava um 50 fólk í starvi, og kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum. Tú fært gott innlit í nógv viðurskifti, so sum sølu, innkeyp og marknaðarføring. Starvið inniber nakað av ferðavirksemi til sølustevnur og til samstarvsfelagar uttanlanda.

Vit kunnu eisini bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning. Vit hava gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið.

**Høvuðsuppgávur**
· Samskifti við viðskiftafólk og veitarar.
· Søla av hvítvørum og radio/sjónvarpsútgerð.
· Marknaðarføring.
· Innkeyp.

**Krøv til umsøkjara**
Tú mást hava áhuga fyri økinum, og best hevði verið, um tú hevur royndir frá líknandi arbeiði. Tað er ein fyrimunur um tú:
· ert fyrikomandi og kundavinaligur.
· kanst arbeiða sjálvstøðugt.
· hevur góð samstarvsevni.
· kanst loysa fleiri uppgávur samstundis.
· ert arbeiðssamur, røkin, fyrikomandi og hugagóður.

Vit leggja dent á, at tú hevur áræði og vilja til at gera mun, til gleði fyri teg sjálvan, starvsfelagar og fyritøkuna.

**Meira fæst at vita**
við at venda sær til Kenneth Samuelsen (ks@lm.fo) ella Leiv Holm (lh@lm.fo) á telefon 35 12 20.

**Umsókn**
saman við avritum av próvskjølum og upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera Pf. Leif Mohr, postboks 3100, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2006.

p/f Leif Mohr Hoyviksvegur 53 Postboks 3100 FO-110 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 e-mail: lm@lm.fo www.lm.fo

TEAM85




Altíð tað nýggjasta

www. sosialurin.fo

FERÐAFRAMSÝNING




Myndir , tekningar v.m. frá tiltakinum verða at síggja í Føroya Banka

Føroya Banki hevur stuðlað tiltakinum UNG Í FØROYUM 2006, og sum liður í hesum verður skipað fyri eini ferðandi framsýning í deildum bankans.

Framsýningarnar verða frá týsdegi kl. 9.30 til og við hósdag kl. 18.00 á hesum støðum:

| | |
|---|---|
| Sørvágur | 21.-23. mars |
| Sandur | 28.-30. mars |
| Fuglafjørður | 4.-6. apríl |
| Klaksvík | 11.-12- apríl |
| Tvøroyri | 18.-20. apríl |

kontoIN